## Mótmæltu fyri deyvum oyrum

Dimmalætting skrivar, at eingin løgtingslimur kom út, tá ið mótmælisgongan hjá musikklærarunum steðgaði við Løgtingið fríggjadagin. Ætlanin var at siga tinglimunum, at musikklærarar vilja hava tíma- og dagpening fyri tíðina, teir ferðast millum skúlarnar. Á leið 30 musikklærarar gingu mótmælisgongu og steðgaðu uttan fyri tinghúsið, har ætlanin var, at Sunleif Rasmussen, formaður, skuldi halda røðu og greiða løgtingslimunum frá misnøgdini hjá musikklærarunum. Men tá eingin tinglimur kom út, varð eingin røða hildin.

## Pedagogar hildu føðingardag



Fríggjadagin 1. juni fylti Føroya Pedagogfelag 25 ár. Dagurin var hildin við mótøku í felagshølunum í Havn og við størri og smærri tiltøkum kring landi. Tá felagið varð stovnað fyri 25 árum síðan, vóru bert á leið 40 limur. Jarvin Feilberg Hansen, formaður í felagnum, sigur at í dag eru tey 1840 limir. Talan er um bæði útlærd fólk og fólk uttan útbúgving. Sosialurin hevur í morgin eina stóra myndafrásøgn frá bæði móttøku og barnagarðstiltøkum.

# – Skriva út nývalu, løgmaður

**- Samgongan vil heldur lækka prísin á luktilsi enn hækka pensjónirnar og stuðulin til stakar uppihaldarar. John Johannessen er so vindandi óður inn á restina á samgonguni, at hann heldur, at tað er betri at løgmaður útskrivar val beinanvegin**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kemur ikki skil á politikkin hjá samgonguni, tímir John Johannessen ikki at vera í samgongu leingi afturat.

Hann er so óður inn á samgonguna, at hann hóttir við at taka stuðulin til samgonguna aftur.

Sum skilið er nú, dugir hann ikki at síggja nakra sum helst orsøk til halda fram í samgonguni.

Tí heldur hann, at tað er líka frægt, at samgongan leggur frá sær nú og at Løgmaður útskrivar Løgtingsval beinanvegin.

Tað verður meiri og meiri skilligt, at ávísir limir í samgonguni duga illa at dansa saman og tá ið Løgtingið uppundir vikuskiftið umrøddi eitt uppskot um at lækka avgjøldini á hvítvørum til húsarhaldið og á lampum og ljósketum, kom rættiligur eldur í samgonguna.

Í hesum sambandi mælti ein meiriluti í fíggjarnevndini av sínum eintingum til eisini at lækka avgjøldini á luktilsi.

Hetta gjørdi tann eina tinglimin í samgonguni, John Johannessen í Javnaðarflokkinum, so vindandi óðan, at hann hótti við at taka stuðulin til samgonguna aftur.

### Púra gak-gak

Hann helt at tað var nógv fyri, at samgongan vildi heldur lækka prísin á luktilsi, lampum og ljósketum, enn at hon vil hækka pensjónirnar og stuðulin til stakar uppihaldarar

- Tað má vera ein mark fyri útgjaring og onkur avgjøld mugu vera fyri at fíggja vælferðina, segði jokarin hjá Javnaðarflokkinum.

- Hetta er tann reini ørskapur og tá má steðgast, legði hann afturat.

Hann helt, at tað hol í høvdið at smalka skattagrundarlagið.

- Hvat skal so henda, tá ið fiskaprísirnir aftur lækka, skal so avgjaldið á luktilsi aftur hækka fyri at fíggja vælferðina.

Hann helt, at hetta var tekin um, at valstríðið var longu byrjað.

- Hetta er fullkomiliga gak, gak.

### Samgongan til hús

Hann helt, at skal hetta vera politikkurin framyvir, skal samgongan heldur leggja frá sær so at løgmaður kann útskriva val beinanvegin.

- Hetta tími eg ikki leingi afturat.

John Johannessen helt, at samgongan hevði nógvar veldugar trupulleikar at taka sær av, men tað gekk ómetaliga strilti at loysa teir.

Hann vísti, hvussu illa tað gekk at hækka fyritíðarpensjónir og stuðulin til stakar forsyrgjarar.

- Og ung húski hava at kalla ongan møguleika at seta føtur undir egið borð, í hvussu so er í høvuðsstaðnum.

- Men hesar trupulleikarnar hava vit ikki stundir at taka okkum av. Vit hava allar undanførslur fyri at sleppa frá at loysa hesar álvarsamu trupulleikarnar, tí tað er meiri umráðandi at lækka prísin á luktilsi, segði ein týðiliga fortørnaður løgtingsmaður.

- Hava vit ikki annað at gera framyvir, er óneyðugt at halda fram við hesi samgonguni segði hann, samstundis sum hann staðfesti, at annars hevði samgongan fingið væl burturúr.

- Hetta sirkussið tími eg ikki at vera við til leingi afturat, endaði John Johannessen hesa salvuna til sínar starvsfelagar í samgonguni.

Hann minti eisini á, tá ið vektgjaldið á bilum hækkaði.

Tá var tað gjaldið hjá teimum minstu og bíligastu bilunum, sum brendu minst orku og sum vóru teir bilarnir, sum pensjónistar høvdu ráð til at koyra í, sum hækkaðu mest, men avgjøldini á teimum stóru dýrunum hækkaðu at kalla slett ikki.



*- Hetta er fullkomiliga gak, gak og hetta sirkussið tími eg ikki leingi afturat, sigur John Johannessen, løgtingsmaður, sum ikki dylir ,hvussu óður hann er inn á restina av samgonguni*

# John hevur onki hugflog

**- John Johannessen hevur ikki hugflog til at hugsa um perspektivini í at lække prísin á luktilsi, sigur Anfinn Kallsberg**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Lækka vit avgjaldið á luktilsi, fara inntøkurnar hjá landskassanum at hækka kortini.

Tað ivast Anfinn Kallsberg ikki í.

Sum tað sæst á greinini omanfyri, er John Johannessen rættiliga óður inn á samgonguna fyri ætlanina um at lækka avgjøldini á luktilsi og á lampum.

Og hann leggur serliga Fólkaflokkin undir at ganga á odda at fáa hesi avgjøldini lækkað.

Men tað var Anfinn Kallsberg ikki keddur av at fáa ábyrgdina fyri.

Formaður fólkafloksins helt, at tað, sum feilar John Johannessen, er, at hann hevði ikki hugflog til at síggja perspektivini í at lækka avgjøldini á luktilsi.



*Tað er nógv fyri at hoyra John Johannessen tosa um alheimsgerð, samstundis sum hann ikki so mikið sum at klárar at hugsa um møguleikarnar í at lækka avgjaldið á luktilsi, heldur Anfinn Kallsberg*

- Veruleikin er jú tann, at lækka vit avgjaldið, kemur meiri peningur í kassan, tí fólk fara at keypa meiri. Tá ið vit lækkaðu avgjøldini á sjónvarpstólum, kom kortini nógv meiri í landskassan, tí fólk fóru at keypa meir

Hann vísti eisini á, at nógv tað mesta, sum føroyingar keypa av luktilsi, verður keypt uttanlands ella tollfrítt í flogfari ella skipi.

- Tað kemur ikki eitt oyra í landskassan.

Anfinn Kallsberg sigur, at verður avgjaldið á luktilsi lækkað, kunnu vit fáa ein dynamikk og ein handil í Føroyum av hesum vørum og hann var sannførdur um, at endin verður, at landskassin fer at fáa nógvar ferðir meir í landskassan, hóast avgjaldið lækkar.

Í løtuni fer landskassin fýra milliónir í inntøkum av avgjaldið upp á luktilsi.

Verður avgjaldið lækkað, fer inntøkan at fýrafaldast, er hann vísur í.

Hann helt eisini, at tað var nógv fyri at hoyra John Johannessen tosa um alheimsgerð, samstundis sum hann ikki so mikið sum at klárar at hugsa hendan tankan.